

# Exxon borar í russiskum Arktis

Deil:



**Jan Müller**

11.08.2014 - 20:13

Oljan.fo

Amerikanska oljufelagið ExxonMobil, sum eisini er partur av føroysku oljuleitingini, fór leygardagin undir at bora ein brunn í russiska partinum av Arktis saman við russiska felagnum Rosneft, skrivar Reuters.

Hetta hendir hóast USA og EU hava gjørt av at boykotta Rusland vegna hendingarnar í Ukraina. Amerikanska felagið hevur gjørt av at byrja at bora í russiskum øki.

Russiski forsetin, sum er ein av heitastu talsmonnunum fyri at fara undir boring í Arktis sigur seg vera sera væl nøgdan við avgerðina hjá teimum báðum feløgunum at fara undir

at finna fjalduna oljuna og gassið í Arktis. Tað er neyðugt við pragmatismu og common sense hóast ósemjuna um Ukraina heldur Putin fyri.

“Okkara samstarv er langsiktað. Vit síggja stórar fyrimunir og eru tilreiðar at arbeiða víðari við okkara avtalu við russar,” sigur Glenn Walker, ameriskanski stjórin í russiska dótturfelagnum hjá ExxonMobil.